Álit

í

løgtingsmáli nr. 23/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin) (Lækka inngjaldið til Vinnusjúkugrunnin og víðka virkisøkið hjá Vinnusjúkugrunninum)

Margit Stóra, landsstýriskvinna í umhvørvismálum, hevur lagt málið fram tann 30. september 2025, og eftir 1. viðgerð tann 23. oktober 2025 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 18. og 25. november 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum, Margit Stórá.

Ein samd nevnd heldur tað vera skilagott at lækka inngjaldið til grunnin, so Vinnusjúkugrunnurin ikki uppbyggir størri kapital, enn neyðugt er. Somuleiðis metir nevndin tað vera gott at víðka arbeiðsøkið hjá grunninum við tí fyri eyga frameftir at kunna arbeiða við upplýsing og fyribyrging í sambandi við vinnusjúkur.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 28. november 2025

Hervør Pálsdóttir forkvinna	Helgi Abrahamsen	Ingilín Didriksen Strøm
Kristianna W. Poulsen	Henrik Old	Steffan Klein Poulsen
	Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur	